# Seinastu bøkur undan jólum

BÓKAÚTGÁVA

Nógv er at gera á prentsmiðjunum í hesum tíðum, men nú liggja so seinastu bøkurnar hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags á hillunum í bókahandlunum.

Bøkurnar hava dreingir sum høvuðspersónar: tað eru teir tríggir Julian, sonur ein politist, Kaspian, sonur ein kong og Artemis, sonur ein millióning. Allir tríggir hava teir serligar eginleikar, sum ger teir áhugaverdar at lesa um.

**Julian og Jim**, sum Laura Trenter hevur skrivað, er onnur bókin um drongin Julian. Í fyrru bókini Pápi er politistur, sum kom út í 2004, varð pápi Julian skotin av limi í einum motursúkklubanda. Pápin kemur undan við lívinum, og drápsmaðurin verður funnin, m.a. tí at Jim, sum eisini er limur í bandanum, avdúkar drápsmannin. Í hesari bókini er onkur eftir Jim og vil gera seg inn á hann, tí at hann hevur slatrað, og tað kann Julian ikki lata henda, tí hann og Jim eru vinir.

Bókin er 150 bls., er heft og Jón Joensen hevur týtt úr svenskum. Hon kostar 140 kr.

**Kaspian kongssonur** er fjórða bókin í røðini um ævintýrheimin Narnia eftir C. S. Lewis. Kaspian noyðist í bardaga móti einum svikafullum kongi fyri at fáa trónu sína aftur og sjálvur gerast kongur. Við sær hevur hann tey fýra børnini, Edmund, Lovisu, Súsannu og Pætur, og leyvan Aslan kemur sjálvandi eisini til hjálpar, tá ið á stendur.

Theodor Hansen hevur týtt Kaspian kongsson, sum er 194 bls og innbundin. Pauline Baynes hevur teknað myndirnar, og bókin kostar 180 kr í bókahandlunum.

**Ævinleikakotan** eftir Eoin Colfer er triðja bókin í røðini um flogvitið Artemis Fowl. Artemis er teldusnillingur og hevur gjørt eina superteldu burtur úr leyslutum, hann hevur stolið frá álvunum. Artemis hevur eina heilt serliga ætlan við telduni, tá ið hann sýnir hana fram fyri einum harðrendum manni við sambondum við mafiuna. Hendingin fær fyrst og fremst avleiðingar fyri lívverja hansara Butler, og Artemis verður hart trýstur.

Bókin er ætlað unga lesaranum, hon er 319 bls. og heft við klaffum. Bergur Rasmussen hevur týtt hana úr enskum, og hon kostar 150 kr í bókahandlum.










FRAMTAK
FRAMTAKSGRUNNUR FØROYA

# Ráðgevi

Framtak bjóðar áhugaðum at søkja fjølbroytt og spennandi starv sum ráðgevi. Tú kemur í tøttum samstarvi við stjóran at arbeiða við vinnuligum menningarætlanum og verða við til at menna Framtak til ein virknan íleggjara í føroyskt vinnulív.

**Arbeiðsuppgávur**
- Fyrireika tilfar til nevndina fyri Framtak
- Samskifta við umsøkjarar, eftirkanna og meta um umsóknir og virði
- Menna sáttmálar og avtalur
- Samráðingar
- Uppfylging av gjørdum íløgum
- Fíggjarstýring
- Samskifti við vinnu og íleggjarar
- Vera nevndarlimur í feløgum, grunnurin eigur í

**Førleikar**
Umsøkjarin skal hava:
- hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni
- góð evni at greina, gott yvirlit og evni at raðfesta uppgávurnar
- góðan málsligan førleika á føroyskum og enskum
- edv-kunnleika, í minsta lagi á brúkarastøði
- góð samstarvsevni og evni at arbeiða sjálvstøðugt

Vit vænta, at tú ert framsíggin og opin fyri at finna loysnir. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan løgfrøði og/ella búskap frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum.

**Setanartreytir**
Starvið er fulltíðarstarv. Setanarviðurskifti og løn verða ásett eftir avtalu.

Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. januar 2007.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Gloriu Kalsø, forkvinnu, á telefon 315623 eftir kl. 17.00 ella Niels Dann West, stjóra, á telefon 315966 ella um teldupost ndw@framtak.fo.

Umsóknin skal sendast til:
Framtaksgrunnur Føroya
Bøkjarabrekka 9
Postboks 3157
110 Tórshavn

**Um Framtak**
Framtak skal eftir marknaðartreytum hava ein virknan leiklut sum kveikjari í føroyskum vinnulívi.
Endamálið hjá Framtak er at virka fyri at menna og fjøltáttað føroyskt vinnulív samfelagnum at gagni.
Framtak er vinnurekandi grunnur, sum eftir marknaðartreytum veitir framtakskapital við at seta partapening í og/ella veita ábyrgdarlán til nýggjar fyritøkur og eldri fyritøkur, sum víðka um virksemið, skulu endurreisast og/ella ganga nýggjar leiðir.

Gjøgnum sítt virksemi sum vágafúsur og tolin íleggjari hevur Framtak møguleika at menna vinnur, har nýskapan og langtíðarætlanir eru neyðugar, og fíggjarligi vinningurin er frammi í tíðini.

Framtak samstarvar við aðrar fíggjarligar íleggjarar at lyfta í felag, har váðin er stórur.